Eysturkommuna

# Størv til Dagstovnin í Gøtu

Søkt verður eftir námsfrøðingum at byrja 10. august 2009

1 námsfrøðing til barnagarðsstovuna »á Látrinum«, 20 tímar um vikuna.

1 námsfrøðing til barnagarðsstovuna »í Gjónni«, 20 tímar um vikuna. Í hesu stovuni leggja starvsfólkini serliga stóran dent á filosofiuna hjá Reggoi Emiliu.

1 námsfrøðing til barnagarðsstovuna »á Helluni«, 30 tímar um vikuna.

1 Starv sum stuðul, á 20 tímar um vikuna, til barn við serligum tørvi.

**Um stovnin:**
Dagstovnurin lat upp 1. februar 2000, og er ásettur til 70 børn. Talan er um 3 barnagarðsstovur og 1 smábarnastovu. Stovnurin liggur í barnavinarligum umhvørvi, við Gøtugjógv.

**Førleikakrøv:**
- Námsfrøðiliga útbúgving.
- Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk fyribils sett ístaðin.

**Vit ynskja av tær:**
- at tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir.
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroytt-an og tryggan gerandisdag.
- at tú vilt vera við til at mynda og menna tað námsfrøðiliga umhvørvið.
- at tú, undir ábyrgd av leiðslu og samstarvi við starvsfólkið, vil verða við til at mynda og menna tað námsfrøðiliga umhvørvið á dagstovninum.

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m. a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast, og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum.
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn.
- at virða tað einstaka barnið
- at ferðast nógv í náttúruni.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðagevarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta í hendi í seinasta lagi týsdagin 16. juni 2009.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Torgerð Hansen, stovnsleiðara, á telefon 73 00 51.

Veðrið Sosialurin Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn



# Val í Iran í dag

Meiri enn 46 milliónir iranar hava atkvøðurætt á forsetavalinum í dag. Valhølini lótu upp klokkan hálvgum fimm okkara tíð, og tíðindastovurnar skriva, at nógv fólk stóðu uttanfyri og bíðaðu. Eygleiðarar vænta eisini, at valluttøkan verður største, síðani Iran bleiv skipað sum lýðveldi fyri 30 árum síðani. Fýra menn stilla upp hesaferð, og alt bendir á, at dysturin stendur millum verandi forsetan, Mahmoud Ahmadinejad, og fyrrverandi forsætisráðharran Mir Hossein Mousavi. Tann seinni verður roknaður sum nýskipanarhugaður og fær serliga stuðul frá teimum yngru. Fær einki valevni meiriluta í dag, verður umval í næstu viku.

# Summarfest á Ternu

Í dag er veitslulag á Býlingshúsinum á Ternuryggi, tí fleiri barnagarðar eru savnaðir til ein hugnaligan dag. Á skránni er ein rúgva av hendingum. Longu klokkan 10 í morgun varð skipað fyri konsert, og sera gott lag var á børnunum. Eftir konsertina fingu børnini ein bita úr pylsuvogninum, og aftaná tað komu klovnar í barnagarðin at gera stuttligar ballónir.

Seinni um dagin komu dansigentur framvið og dansaðu saman við børnunum.

Seinast á skránni vóru foreldrini boðin við, tí býlingshúsið á Ternuryggi hevur 21 ára føðingardag sunnudagin, og hann verður hátíðarhildin í dag.



*Eftir at pylsurnar vóru etnar komu klovnar við serligum ballónum*







